# KÍF er flúgvandi

**FLOGBÓLTUR** Kvinnurnar úr Kollafirði hildu leygardagin á Toftum fram, har tær sleptu í Trongisvági fyri viku síðani, og KÍF hevur tikið tvey stór fet frá botninum



*KÍF-kvinnurnar vóru ovurfegnar eftir sigurin á Ternuni, sum var annar útisigurin á rað hjá KÍF*

*Myndir: Álvur Haraldsen*

Hilmar Jan Hansen

Tveir sigrar á rað. Eingin ivi man vera um, at tað er ein góð kensla hjá KÍF-kvinnunum, tí síðsta kappingarár vóru tær langt frá at uppliva nakað, ið bara minti um tað. Men ikki minni er tað veruleikin, eftir at KÍF fyrst á útivølli vann á TB og nú á útivølli eisini vann á Ternuni.

Ikki var heldur sørt, at fólk í Kollafirði høvdu ein varhuga av, at okkurt gott kundi spyrjast burtur úr júst hesum dystinum, tí kollfirðingar mundu eiga væl og virðiliga bróðurpartin av áskoðarunum, ið vóru komnir í skúlahøllina á Toftum at hyggja.

Tað var tó heimaliðið, ið legði betur frá landi, og kom á odda 6-0. Men kortini kom KÍF afturíaftur og endaði við at vinna spennandi endabrestin á settinum, ið endaði 26-28. Tær í Ternuni fullu tó ikki í fátt, men bygdu í øðrum setti víðari á tað, sum hevði riggað í byrjanini, so nú stóð 1-1 í settum.

Eisini í triðja setti sá eina góða løtu út til, at Ternan kundi bíta frá sær, tí toftakvinnur vóru á odda upp til 18, men so tók KÍF yvir og vann javna og tætta settið, áðrenn tað í fjórða setti ongantíð gjørdist serliga spennandi, tí kollfjarðarkvinnur trygt og miðvíst koyrdu sigurin heim.

### KÍF snøgt sagt betri

– Tað vísti seg, at KÍF-kvinnurnar vóru meira uppsettar og klárar enn vit, og tá tað sá út til, at vit kundu koma innaftur í dystin, vóru tær nógv meira við upp á tað og vístu seg snøgt sagt at vera betri enn vit, sigur Katrin Olsen, spælandi venjari hjá Ternuni.

– Vit royndu at lesa tær av, men hvørja ferð vit hildu, at vit høvdu fingið fatur í teimum, broyttu tær spælið, so vit ikki kundu fylgja ordiliga við. Eisini høvdu vit gjørt onkrar broytingar á liðnum, sum tó ikki riggaðu so væl, so tí var einki at siga til, at KÍF vann henda dystin. Men vit hava meira í okkum og skulu nokk koma sterkt aftur.

Ternan hevur vunnið sett í øllum dystunum higartil, uttan einum, so tað kann væl henda seg, at kvinnurnar á Toftum fyrr ella seinni gera bart. Hinvegin hava tær úr Kollafirði longu gjørt tað, og við sigrinum leygardagin tóku tær enn eitt fet frá botninum í Eik-liguni.

# Mjølnir er við

**FLOGBÓLTUR** Hóast tað gekk javnt á tvey tey fyrstu settini, hevði Mjølnir fleiri streingir at spæla uppá og var so mikið sannførandi í triðja setti, at talan gjørdist um greiðan sigur

Hilmar Jan Hansen

Bæði TB og Mjølnir høvdu brúk fyri einum sigri, tá tey møttust í Trongisvági leygardagin. Fyri viku síðani tapti TB á heimavølli fyri KÍF, og Mjølnirkvinnurnar fóru tómhentar heimaftur av Kambsdali, har tær máttu lúta fyri ÍF.

At bæði vildu vinna, sást eisini frá byrjan, tí tvey tey fyrstu settini vóru rættiliga jøvn. Í fyrsta setti byrjaði TB væl, kom á odda 8-2 og hevði leiðsluna heilt upp til 23, men spakuliga kom Mjølnir meira og meira fyri seg og fekk í evstu løtu tikið settið. Í øðrum setti var Mjølnir alla tíðina eitt vet frammanfyri og fór so frá TB, tá komið var upp í 15, og klaksvíkskvinnur sóu alsamt sterkari út.

Slett eingin ivi var um yvirvágina í triðja setti, tí tá vístu kvinnurnar hjá Mjølnir veruliga, at tær vóru betra liðið. Blokkurin riggaði øgiliga væl, og til tíðir var álopsspælið eisini gott, og tað stutta av tí langa var, at Mjølnir spældi TB av vøllinum og tryggjaði sær kærkomna 3-0 sigurin.

Sostatt er Mjølnir væl við har frammi, við sama stigatali sum Fleyr og bara tvey stig aftan fyri SÍ. Hinvegin er tað ikki enn av álvara farið at líkjast hjá TB, sum í vár spældi FM-finalur, so í løtuni bendir einki á, at TB í vetur megnar at bjóða teimum fremstu av.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

**TB - Mjølnir** 0-3
25-27, 19-25, 9-25

**Ternan - KÍF** 1-3
26-28, 25-17, 23-25, 19-25

**SÍ-Fleyr** 3-2
25-18, 21-25, 25-20, 18-25, 15-7



## Eik-ligan *kvinnur*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIÐ | TAPT | VUNNIN SETT | TAPT SETT | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | SÍ | 4 | 4 | 0 | 12 | 3 | 9 | 8 |
| 2 | Fleyr | 4 | 3 | 1 | 11 | 5 | 6 | 6 |
| 3 | Mjølnir | 4 | 3 | 1 | 10 | 4 | 6 | 6 |
| 4 | TB | 4 | 2 | 2 | 8 | 10 | -2 | 4 |
| 5 | KÍF | 4 | 2 | 2 | 7 | 9 | -2 | 4 |
| 6 | ÍF | 3 | 1 | 2 | 3 | 7 | -4 | 2 |
| 7 | Dráttur | 3 | 0 | 3 | 4 | 9 | -5 | 0 |
| 8 | Ternan | 4 | 0 | 4 | 4 | 12 | -8 | 0 |

# Spenningur í Sørvági

**FLOGBÓLTUR** Kvinnurnar hjá SÍ og Fleyr skiftust um at vinna settini, men í evstu løtu hevði SÍ tað, sum skuldi til fyri at vinna fimta og avgerandi settið



Hilmar Jan Hansen

Tá onkrir av royndaru spælarunum fara av einum liði, ræður um at finna aðrar í teirra stað. Millum berandi kreftirnar á kvinnuliðnum hjá SÍ hava verið bíggjarsystrarnar, Birgit og Helga Guttesen. Í fjør fór Birgit til Mjølnir, og í ár er Helga farin til ÍF.

Hetta hevur sjálvandi við sær, at tað hjá SÍ ræður um at styrkja tóma plássið eftir Helgu, og tá liðið leygardagin tók ímóti Fleyr í skúlahøllini í Sørvági, sá henda uppgávan í øllum førum út til at vera loyst. Heidi Christiansen, sum annars mest hevur verið á miðjuni, spældi nú á diagonalinum – og tað kláraði hon sera væl, bæði í álopsspælinum og við góðum servum.

Dysturin leygardagin var ein av teimum, ið kann fáa stóra ávirkan á, hvat lið er ovast, tá fyrsti triðingurin av kappingini er farin um bak. Oddaliðið tá fær pláss í steypafinaluni, so liðini leggja stóran dent á at standa seg væl fyrsta triðingin.

### Upplagdur fimmsettari

SÍ byrjaði dystin væl við góðum verjuspæli, ikki minst á gólvinum, umframt at Annika á Stongum frá hevaraplássinum fleiri ferðir fann tóm øki á hinari vallarhálvuni, so hon kundi lobbað nøkur stig heim. Men longu í øðrum setti byrjaði Fleyr at koma fyri seg, og við skjótum og góðum spæli eydnaðist at leggja trýst á SÍ, ið ikki fekk verjuspælið at rigga líka væl. Somuleiðis var sera javnt í triðja setti, ið SÍ tók.

Sum fjórða sett byrjaði, kundi tað saktans sæð út, sum var SÍ á veg ímóti einum óvæntað tryggum sigri, tí sørvágskvinnur vóru fleiri stig á odda, áðrenn Fleyr kom fyri seg og bardi seg innaftur í dystin. Fleyr tók eisini hetta settið, og tí gjørdist tað til ein fimmsettara, ið samanlagt eisini mundi vera einasti rætti endin á einum spennandi og í løtum væl spældum dysti, har liðini hvørt í sínum lagi vóru náðileys, tá mistøk blivu gjørd hinu megin netið.

Fimta settið sá eisini í eina løtu út til at gerast minst líka spennandi, sum dysturin hevði verið yvir tey fýra undanfarnu settini. Men tá tað stóð á jøvnum 6-6, gjørdi SÍ avgerandi lopið og fór avstað. Fleyr fekk ikki fatur í servunum, so tí gjørdist tað ein sannførandi sigur til SÍ í hesum settinum, tí Fleyr fekk bara eitt stig aftrat.

Hóast SÍ hesa ferð var omaná, man lítið vera at ivast í, at bæði liðini fara at gerast drúgv í kappingini. Hetta var fyrsti ósigurin hjá Fleyr í fýra dystum, og hann gjørdi ikki meira skaða enn so, at Fleyr framvegis er nummar tvey, tvey stig aftan fyri SÍ, sum hevur vunnið sínar fýra higartil.